# RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

## TÓRSHAVN

## ÁRSROKNSKAPUR

## 2014

| Til Ráðið fyri Ferðslutrygd |
|---|

# Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Váttan frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Lýsing av virkseminum** | |
| Upplýsingar um ráðið | 4 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2014** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 5 |
| Rakstrarroknskapur | 7 |
| Fíggjarstøða | 8 |
| Notur | 10 |

## Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársroknskapin fyri 2014 hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

Ársroknskpurin er settur upp samsvarandi ásetingum, ið føroysk lóggáva setur roknskaparhaldi.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum, fíggjarligu støðu, rakstrarúrslitinum.

Ársroknskapurin verður lagdur fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Tórshavn, tann 16. januar 2015

**Stjórn**

Brynhild Høgnadóttir
stjóri

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Kári Thorsteinsson<br>nevndarformaður | Armgarð Steinhólm<br>nevndarlimur | Ingunn Eiriksdóttir<br>nevndarlimur |
| Jákup av Skarði<br>nevndarlimur | Eiler Fagraklett<br>nevndarlimur | |

Ársroknskapurin er lagdur fram og góðkendur á ársaðalfundi felagsins, tann

____________________________
fundarstjóri

## Váttan frá óheftum grannskoðara

***Til Ráðið fyri Ferðslutrygd***

**Átekning til ársroknskapin**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2014.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við góðan roknskaparsið. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

**Ábyrgd grannskoðarans**

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Váttan frá óheftum grannskoðara

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2014 og av úrslitinum av virksemi ráðsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2014 samsvarandi góðan roknskaparsið.

Tórshavn, tann 16. januar 2015

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Jógvan Joensen
løggildur grannskoðari

## Upplýsingar um ráðið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | Ráðið fyri Ferðslutrygd<br>Tungugøta 4<br>Postsmoga 3209<br>FO-110 Tórshavn | |
| | Telefon: | 220064 |
| | Heimasíða: | www.rff.fo |
| | Kommuna: | Tórshavnar |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. desember |
| **Nevnd** | Kári Thorsteinsson<br>Armgarð Steinhólm<br>Ingunn Eiriksdóttir<br>Jákup av Skarði<br>Eiler Fagraklett | |
| **Stjórn** | Brynhild Høgnadóttir | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar**<br>løggilt grannskoðanarvirki<br>Hoyvíksvegur 5, Postrúm 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefax: 35 17 01<br>Teldubústaður: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin er løgd fram eftir samsvarandi ásetingum, ið føroysk lóggáva setur roknskaparhaldi.

Ársfrásøgnin er løgd fram eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár.

**Alment um innrokning og virðisáseting**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar í stigum, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavning á fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herí avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum fylgja av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapin.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva ráðnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr ráðnum, og virðið kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Innrokningar og virðisásetingar taka hædd fyri tapum og váðum, ið vóru væntað við roknskaparlok, sum síðani eru sannað ella avsannað innan ársfrásøgnin verður løgd fram.

## Rakstrarroknskapur

**Nettosøla**

Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Stuðul verður innroknaður smb. móttiknum játtanum og tíðargreinaður.

**Annar uttanhýsis kostnaður**

Annar uttanhýsis kostnaður er kostnaður til sølu, marknaðarføring, tiltøk, fyrisiting, leigu og tap av áognarum.

## Fíggjarstøðan

**Áogn**

Áogn frá sølu og tænastuveitingum verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Niðurskrivað verður til nettorealisiónsvirðið fyri at standa ímóti møguligum tapi.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, er goldin kostnaður, sum viðvíkur komandi roknskaparárum.

## Nýttur roknskaparháttur

### Skuld

Onnur skuld, sum fevnir um vøru- og tænastuskuld og aðra skuld, verður tikið við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virði.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2014 | 2013 |
|---|---|---|---|
| 1 | Inntøkur | 2.163.657 | 1.757.893 |
| | **Nettosøla** | **2.163.657** | **1.757.893** |
| 2 | Akfarskostnaður | -9.574 | -3.088 |
| 3 | Høliskostnaður | -110.814 | -152.428 |
| 4 | Fyrisitingarkostnaður | -281.778 | -243.851 |
| 5 | Starvsfólkakostnaður | -606.406 | -598.572 |
| | **Kostnaðir** | **-1.008.572** | **-997.939** |
| | Hjálmaátak | -123.019 | -176.133 |
| | Børn og ferðsla | -3.440 | -1.480 |
| | Ungdómur og ferðsla | 0 | -11.825 |
| | Ránið / UNG | 0 | -32.475 |
| 6 | Undirvísing | -223.518 | -229.104 |
| | Rúsdrekka og ferðsla | -133.564 | -94.314 |
| | Ferðslukanning | 0 | -20.000 |
| 7 | Undirvísingartilfar | -632.963 | -38.687 |
| | Lýsing | -4.023 | 0 |
| | Røtt íbinding av børnum | -180.991 | 0 |
| | Hámarksferðing | 0 | -116.769 |
| | Er peran í lagi | 0 | -3.047 |
| | Ansa eftir hvørjum øðrum í ferðsluni | 0 | -12.500 |
| | Verndareinglar | 0 | -5.809 |
| | **Tiltøk** | **-1.301.518** | **-742.143** |
| | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | 0 | -1 |
| | **Ársúrslit** | **-146.433** | **17.810** |

**Uppskot til býti av ársúrsliti:**

| | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| Flutt úrslit | 0 | 17.810 |
| Býtt frá fluttum úrsliti | -146.433 | 0 |
| **Býtt tilsamans** | **-146.433** | **17.810** |

## Fíggjarstøða

**OGN**

| Nota | | 31/12 2014 | 31/12 2013 |
|---|---|---|---|
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 10.400 | 25.802 |
| | Depositum | 22.500 | 22.500 |
| | Tilgóðhavandi meirvirðisgjald | 0 | 58.175 |
| | Tíðaravmarkingar | 7.000 | 0 |
| | Áogn tilsamans | 39.900 | 106.477 |
| 8 | Peningur | 173.627 | 284.738 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **213.527** | **391.215** |
| | **OGN TILSAMANS** | **213.527** | **391.215** |

| Nota | **SKYLDUR** | 31/12 2014 | 31/12 2013 |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 9 | Flutt úrslit | 202.527 | 348.961 |
| | **Eginogn tilsamans** | **202.527** | **348.961** |
| | **Skuld** | | |
| | Vøru- og tænastuskuld | 11.000 | 42.254 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 11.000 | 42.254 |
| | **Skuld tilsamans** | **11.000** | **42.254** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **213.527** | **391.215** |

## Notur

| | 2014 | 2013 |
|---|---|---|

### 1. Inntøkur

| | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| Stuðul frá Landsstýrinum | 1.000.000 | 1.000.000 |
| Limagjald frá kommunum og øðrum | 190.859 | 190.859 |
| Søla av vestum | 360 | 4.320 |
| P/F Trygd | 352.190 | 335.486 |
| P/F Tryggingarfelag Føroya | 575.248 | 227.228 |
| P/F Føroya Bjór | 45.000 | 0 |
| | **2.163.657** | **1.757.893** |

### 2. Akfarskostnaður

| | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| Brennievni | 347 | 0 |
| Trygging og vegskattur | 5.113 | 2.848 |
| Endurgjald fyri egnan bil | 4.114 | 0 |
| Bilur, annað | 0 | 240 |
| | **9.574** | **3.088** |

### 3. Høliskostnaður

| | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| Húsaleiga | 106.000 | 108.000 |
| Trygging | 399 | 1.699 |
| Viðlíkahald/umvæling | 3.615 | 2.342 |
| Reingerð | 0 | 478 |
| Høliskostnaður | 800 | 39.909 |
| | **110.814** | **152.428** |

## Notur

| | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| **4. Fyrisitingarkostnaður** | | |
| Skrivstovulutir | 45.756 | 61.644 |
| Umboðan | 0 | 3.900 |
| Telefon og internet | 27.734 | 30.898 |
| Post- og tænastugjøld | 3.055 | 1.603 |
| Grannskoðan | 18.691 | 17.236 |
| Roknskapar- og bókhaldshjálp | 36.000 | 36.000 |
| Tryggingar | 4.043 | 5.304 |
| Limagjøld | 4.743 | 3.500 |
| Ferða- og fundaútreiðslur | 76.478 | 48.079 |
| Gávur o.a. | 500 | 4.713 |
| Lýsingar | 11.825 | 300 |
| Bankakostnaður | 2.154 | 1.850 |
| Skeið o.l. | 13.440 | 24.565 |
| Norðurlendskur ársfundur | 36.861 | 0 |
| Aðrir kostnaðir | 498 | 4.259 |
| | **281.778** | **243.851** |

| | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| **5. Starvsfólkakostnaður** | | |
| Løn | 1.045.597 | 1.000.184 |
| Flutt til tiltøk | -614.842 | -571.060 |
| Eftirløn | 136.450 | 134.046 |
| Samhaldsfasti, Barsilsgjald, ALS | 39.201 | 35.402 |
| | **606.406** | **598.572** |

| | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| **6. Undirvísing** | | |
| Lønarútreiðslur | 136.940 | 114.400 |
| Aðrir kostnaðir viðv. undirvísing | 86.578 | 114.704 |
| | **223.518** | **229.104** |

## Notur

| | 2014 | 2013 |
|---|---|---|
| **7. Undirvísingartilfar** | | |
| Lønarútreiðslur | 477.902 | 0 |
| Aðrir kostnaðir viðv. undirvísingartilfari | 128.504 | 38.687 |
| | **606.406** | **38.687** |

| | 31/12 2014 | 31/12 2013 |
|---|---|---|
| **8. Peningur** | | |
| P/F Bank Nordik | 173.627 | 284.738 |
| | **173.627** | **284.738** |
| **9. Flutt úrslit** | | |
| Flutt úrslit 1. januar 2014 | 348.960 | 331.151 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | -146.433 | 17.810 |
| | **202.527** | **348.961** |